# eftir sannleikanum

fangatippið var tvørturímóti í grannalondunum El Salvador og Guatemala. USA hevði felt tað demokratiskt valda stýrið í Guatemala í 1954, og tað verður mett, at 200.000 fólk høvdu verið offur fyri skiftandi hernaðarstýrum.

Seks av navnframastu jesuittunum í heiminum vórðu herviliga fyribeindir, dripnir í miðamerikanska lærda háskúlanum í San Salvador í 1989 av eini Alcatl herdeild, ið hevði fingið venjing í Fort Benning í Georgia, USA. Hin ógvuliga djarvi erkabispurin Romero var myrdur, meðan hann hevði messu. Tað verður mett, at 75.000 fólk doyðu. Hví vórðu tey dripin? Tey vórðu dripin, tí tey hildu, at eitt frægari lív var gjørligt og mátti fáast í lag. Henda fatan teirra gjørdi, at tey alt fyri eitt vórðu markað sum kommunistar. Tey doyðu, tí tey tordu at ivast í verandi støðuni, ta endaleysu oyðimørkina av fátækradømi, sjúkum, mannminking og kúging, sum hevði verið teirra kor, síðani tey komu í verðina.

USA fekk at enda felt sandinistastýrið. Tað kravdi fleiri ár, og mótstøðan varð hørð, men ein náðileys búskaparlig herferð og 30.000 deyð gjørdu umsíðir enda á dirvinum í nicaraguanska fólkinum. Tey vóru einaferð enn niðurundirkomin av møði og fátækradømi. Kosinohøllirnar fluttu aftur til landið. Líðugt var við ókeypis útbúgving og ókeypis heilsutænastu. Tær stóru fyritøkurnar komu aftur so tað munaði. ”Fólkaræði” hevði vunnið.

Men hesin ”politikkur” var á ongan hátt avmarkaður til Miðamerika. Hann varð førdur um allan heim. Hann fær ongan enda. Og tað tykist, sum er hetta ongantíð hent.

> *Innrásin í Irak var ein yvirgangsgerð, eitt skommleyst dømi um statsyvirgang, sum vísti eina fullkomiliga vanvirðing fyri altjóða løgum. Innrásin var eitt sjálvráðið hernaðarátak sett í verk við eini røð av lygnum oman á lygnum og við umfatandi villleiðing av fjølmiðlunum og harvið av almenninginum.*

USA stuðlaði og í mongum førum kveikti hvørt høgrasinnað hernaðarligt einaræði í heiminum eftir seinna heimsbardaga. Eg vísi til Indonesia, Grikkaland, Uruguay, Brasilia, Paraguay, Haiti, Turkaland, Filipsoyggjar, Guatemala, El Salvador og sjálvandi Chile. Ræðuleikarnir, sum USA voldi í Chile, kunnu ongantíð verða reinsaðir og ongantíð verða fyrigivnir.

Fleiri hundrað túsund fólk doyðu í hesum londum. Fór tað soleiðis fram? Og kunnu tey øll setast í samband við amerikanska uttanríkispolitikkin? Svarið er jú, hetta fór fram soleiðis fram, og tey hava samband við uttanríkispolitikkin hjá USA. Men vit fást illa at trúgva tí.

Tað hendi ikki. Einki hendi nakrantíð. Sjálvt tá ið tað hendi, hendi tað ikki. Sama gjørdi. Tað hevði ongan áhuga. Brotsverkini hjá USA hava verið reglulig, støðug, meinsk, miskunnarleys, men í roynd og veru eru tey fá, sum hava borið hetta upp á mál. Ta viðurkenning eiga vit at lata USA. Tað hevur dugað á ein púra sakliga hátt at handfarið sítt vald um allan heimin, meðan tað samstundis hevur latið seg í grýluklæðir sum tann góða, altfevnandi megin. Tað er eitt framúrskarandi, næstan andborið og ómetaliga væleydnað slag av hypnosu.

Eg leggi hetta fram fyri tykkum at hugsa um: USA er uttan iva størsti sjónleikurin, sum til er. Harðligt, kenslusørt, forhánisligt og eirindaleyst kann tað vera, men tað er eisini ómetaliga dugnaligt. Sum ein sølumaður er tað á ferð, og tann besta søluvøran er sjálvgleðin. USA er ein vinnari. Hoyr allar amerikanskar forsetar í sjónvarpi siga orðini ”amerikanska fólkið”, sum í hesum setningi: ”Eg sigi við amerikanska fólkið, at stundin er komin at biðja og at verja rættindini hjá amerikanska fólkinum, og eg heiti á amerikanska fólkið um at stuðla forseta teirra í teimum tiltøkum, hann fer at seta í verk til frama fyri amerikanska fólkið.”

Hetta er ein skyggjandi listabragd. Mál verður brúkt til at halda hugsan frá sær. Orðini ”amerikanska fólkið” gerast ein mjúkur koddi av trygd. Tú sleppur undan at hugsa. Legg teg bara afturá. Koddin fær kanska títt vit og títt kritiska skil at kódna, men tað er kenst ógvuliga hugaligt. Hetta er sjálvandi ikki galdandi fyri tær 40 milliónirnar av borgarum, sum liva undir fátækramarkinum og tær 2 milliónirnar av monnum og kvinnum, sum verða hildin fangar í tí stóra gulag av fangahúsum um alt landið.

USA leggur einki í ”lágorkusamanbrestir” longur. Tað sær onga meining longur í at avmarka seg ella ganga sniðgøtur. Tað leggur kortini á borðið uttan mannamun. Tað leggur líka í ST, altjóða lóg ella aðrar hugsanir, slíkt verður virt sum máttloysi og hildið at vera óviðkomandi. Og so hevur tað sitt egna jarmandi smálamb í hafti aftanfyri seg, tað neyðarsliga og dølska Stórabretland.

Hvat er hent okkara moralska viðkvæmi? Hava vit nakrantíð havt tað? Hevur tað nakað samband við eitt orð, sum næstan ikki verður brúkt longur – samvitsku? Eina samvitsku, sum ikki bara hevur at gera við okkara egnu gerðir, men eisini við okkara felags ábyrgd av gerðum hjá øðrum? Er alt hetta deytt? Hugsið um Gauntánamo. Fleiri hundrað fólk í varðhaldi í meira enn trý ár uttan at ákæra er reist ímóti teimum, uttan at tey koma fyri rættin og fáa løgfrøðiliga verju, lokað inni í óásetta tíð. Henda púra lógleysa skipanin verður hildin uppi ímóti øllum ásetingum í Geneve sáttmálanum. Tað verður ikki bara tolt, men neyvan tikið upp á tungu í tí, sum kallast ”alheimssamfelagið”. Henda brotsliga valdsgerðin er sett í verk av einum landi, sum kallar seg ”leiðara av tí frælsa heiminum”. Hugsa vit um tey, sum eru í Guantánamo? Hvat siga fjølmiðlarnir um tey? Onkuntíð sæst ein lítil stubbi tilvildarliga á síðu 6 í onkrum blaði. Tey eru slept upp á fjall í einum ongamannalandi, haðani tey kanska ongantíð koma aftur. Í løtuni eru nógv teirra farin í hungursverkfall og verða nú tvingsilsfóðrað, teirra millum eru bretskir statsborgarar. Einki putl og fjas er við hesum fóðringum. Einki sissandi ella doyvandi. Bara ein slanga stungin upp í nøsina og niður í hálsin. Tú spýrt blóð. Hetta er píning. Hvat hevur bretski uttanríkismálaráðharrin sagt um hetta? Einki. Hvat hevur bretski forsætismálaráðharrin sagt um hetta? Einki. Hví ikki? Tí USA hevur sagt: at finnast at okkara framferð í Guantánamo er ein óvinarlig gerð. Annaðhvørt eru tit tit við okkum ella ímóti okkum. So Blair heldur munn.

Innrásin í Irak var ein yvirgangsgerð, eitt skommleyst dømi um statsyvirgang, sum vísti eina fullkomiliga vanvirðing fyri altjóða løgum. Innrásin var eitt sjálvráðið hernaðarátak sett í verk við eini røð av lygnum oman á lygnum og við umfatandi villleiðing av fjølmiðlunum og harvið av almenninginum. Eitt átak, sum skuldi útbyggja amerikanst hernaðarligt og búskaparligt eftirlit í Miðeystri, og sum – tá ið allar aðrar grundgevingar høvdu víst seg at vera ósannar – varð lýst sum ein frígering. Ein ótrúligt uppáhald hjá eini hernaðarmegi, ið hevur ábyrgdina av at drepa og løsta túsundir og túsundir av sakleysum fólkum.

Vit hava ført píning, tyssibumbur, reinsað uran, óteljandi tilvildarlig dráp, neyð, mannminking og deyða til irakska fólki og kalla tað ”at geva Miðeystur frælsi og fólkaræði”.

Hvussu nógv fólk mást tú drepa fyri at gera teg skikkaðan at verða skírdur hópdrápsmaður og krígsbrotsmaður? Eitthundrað túsund? Tað mátti verið ivaleyst, hevði eg hildið. Tí hevði tað verið rætt, at Bush og Blair vórðu settir fyri altjóða krígbrotsmannadómstólin. Men Bush hevur dugað væl. Hann hevur ikki viðurkent dómstólin. Tí hevur hann ávarað um, at verður nakar amerikanskur hermaður ella politikkari førdur fram fyri dómara har, so sendir hann sínar marinarar. Men Blair hevur undirskrivað sáttmálan og kann tí verða rættarsøktur.

Deyðið hevur í hesum sambandi ongan týdning. Bæði Bush og Blair seta deyðan til viks. Í minsta lagi 100.000 irakar vórðu dripnir av amerikanskum bumbum og rakettum, áðrenn irakiski uppreisturin tók seg upp. Hesi fólkini hava ongan týdning. Teirra deyði er ikki til. Tey eru tóm. Tey verða ikki so frægt sum skrásett at vera deyð. ”Vit fáast ikki við at telja lík,” segði amerikanski herovastin Tommy Franks.

Tíðliga í innrásini varð ein mynd á framsíðuni av einum bretskum blaði, sum vísti Tony Blair mussa ein irakiskan smádrong á kjálkan. ”Ein takksamur drongur,” segði yvirskriftin. Nakrar fáar dagar eftir var ein søga og ein mynd longri inni í blaðnum, sum vísti ein annan fýra ára gamlan smádrong, hesin við ongum armum. Hansara familja varð sprongd í luftina av einari rakett. Hann var tann einasti, ið slapp undan við lívinum. ”Nær fái eg armarnar aftur? spurdi hann. Søgan varð slept. Tony Blair tók ikki henda dreingin upp í føvningin, hvørki hann ella nakað annað illa løstað barn, tíansheldur nakað bløðandi lík. Blóð er skitið. Tað dálkar skjúrtuna og slipsið, tá ið tú skal flyta fram eina álvarsliga røðu í sjónvarpinum. Teir 2000 deyðu amerikanarnir eru til ampa. Teir verða førdir heim til síni í myrkri. Jarðarferðir eru ikki ágangandi. Har er eingin vandi. Tey løstaðu rotna í sínum seingjum, summi restina av lívinum.

USA hevur nú 702 hernaðarstøðir um allan heimin í 132 londum við Svøríki sum einum heiðurligum undantaki. Vit vita ikki heilt, hvussu amerikanarnir komu seg hagar, men nú eru teir har.

USA eigur 8000 virknar kjarnorkuspreingiløðingar. Tvey túsund eru settar til, til reiðar at verða skotnar út innan fyri eitt korter. Tað mennir nýggj kjarnorkuvápn, kallað bumbuskýlisbrótarar. Bretar, sum altíð vilja samstarva, ætla at skifta út teirra egnu Trident kjarnorkuløðingar. Hvørjum eru tær ætlaðar? Osama bin Laden? Tær? Mær? Joe Dokes? Kina? París? Hvør veit? Tað, sum vit vita, er at hesin barnsligi ørskapur – at eiga og kunna hótta við kjarnorkuvápnum – er hjartað sjálvt í amerikanskari politiskari hugsan. Vit skulu minnast á, at USA er í varandi hernaðarstøðu og vísir eingi tekin um at slaka og taka sær av løttum.

Nógv túsund, um ikki milliónir, av fólki í USA sjálvum eru hørm, vamlast við og skammast um tað, sum stjórn teirra ger, men sum støðan er, eru tey eingin savnað politisk megi – ikki enn. Men stúranin, ótryggleikin og óttin, sum vit síggja vaksa dag um dag í USA fer neyvan at minka.

Eg veit, at Bush, forseti, hevur nógvar ógvuliga dugnaligar røðuskrivarar, men eg hevði havt hug at bjóðað meg fram sjálvur. Eg skjóti upp hesa stuttu røðu, sum hann kundi hildið í sjónvarpi fyri allari tjóðini. Síggi hann fyri mær tignarligan, við væl greiddum hári, álvarsligan, dámligan, hjartaligan, ofta lokkandi, stundum við einum beiskum brosi, merkiliga dragandi, ein maður hjá monnum.

”Guð er góður. Guð er stórur. Guð er góður. Mín guður er góður. Guðurin hjá bin Laden er óndur. Hansara guður er óndur. Guðurin hjá Saddam var óndur guður, men hann hevði ongan guð. Hann var eitt illmenni. Vit

> *Lívið hjá einum rithøvundi er eitt ógvuliga erkvisið, næstan nakið virksemi. Tað eiga vit ikki at gráta um. Høvundurin ger sítt val og sleppur ikki undan tí. Men tað er rætt at siga, at hann er opin fyri øllum ættum, og summar ættir eru kaldar. Tú ert einsamallur og vágar nógv. Tú finnur einki skjól, onga verju – uttan so at tú lýgur – og gert tú tað, hevur tú sjálvandi bygt tína egnu verju, og ert – kundi verið sagt – vorðin politikari.*

eru ikki illmenni. Vit høgga ikki høvdið av fólki. Vit trúgva upp á frælsi. Tað ger Guð eisini. Eg eri einki illmenni. Eg eri demokratiskt valdi leiðarin í einum frælsiselskandi fólkaræði. Vit fara virðiliga við teimum, sum verða sett í elektriska stólin. Vit fara virðiliga við teimum, sum fáa deyðssproytuna. Vit eru ein stór tjóð. Eg eri eingin einaræðisharri. Hann er. Eg eri einki ómenni. Hann er. Og hann er. Allir eru ómenni. Eg havi moralskan myndugleika. Síggja tit henda nevan? Hetta er mín moralski myndugleiki. Og gloymið tað ikki.”

Lívið hjá einum rithøvundi er eitt ógvuliga erkvisið, næstan nakið virksemi. Tað eiga vit ikki at gráta um. Høvundurin ger sítt val og sleppur ikki undan tí. Men tað er rætt at siga, at hann er opin fyri øllum ættum, og summar ættir eru kaldar. Tú ert einsamallur og vágar nógv. Tú finnur einki skjól, onga verju – uttan so at tú lýgur – og gert tú tað, hevur tú sjálvandi bygt tína egnu verju, og ert – kundi verið sagt – vorðin politikari.

Eg trúgvi, at ímóti øllum líkindum er ein óræddur, óvikandi og avgjørdur mentanarligur vilji sum samfelagsborgari at finna veruliga sannleikan í okkara lívi ein umráðandi skylda, ið liggur á okkum øllum. Hon er eitt krav. Er ikki hesin viljin partur av okkara politisku hugsjónum, hava vit onga vón um at kunna vinna aftur tað, sum er so nær við at gleppa okkum av hondum – mannasømd og mannasómi.

*ghoydal@post.olivant.fo*

*© The Nobel Foundation 2005*